# Viðkomandi skeið um mannarættindi

## Í heyst bjóðar Amnesty International øllum næmingum og lærarum á skeið um mannarættindi

**Sambært endamálsorðing fólkaskúlans, skal fólkaskúlin vera við til at:**
*"búgva næmingarnar til innlivan, samavgerð, samábyrgd, rættindi og skyldur í einum fólkaræðisligum samfelag. Undirvísing og gerandislív skúlans eiga at vera grundað á andsfrælsi, tollyndi, javnvirði og fólkaræði."*

Rigmor Dam

Altjóða mannarættindi er ein partur av endamálinum í fólkaskúlalógini. Amnesty International arbeiðir fyri, at børn í Føroyum kenna síni rættindi og rættindini hjá øðrum, og at lærarar læra at undirvísa í mannarættindum.

Tí bjóðar Føroya deild øllum fólkskúlalærarum og næmingum á skeið í mannarættindum í heyst 2010 í Stephanssons Húsið á Kongabrúnni í Havn.

### Lærarar læra

Annað skeiðið er fyri lærarum, sum undirvísa í fólkaella miðnámsskúlum, men allir aðrir fakbólkar eru eisini vælkomnir.

Í sambandi við dagsskeiðini fyri lærarar, koma royndir danskir undirvísarar til Føroya at kunna um og at geva íblástur til, hvussu til ber at undirvísa í mannarættindum.

Skeiðið fyri lærarum verður dagarnar 13., 14. og 15. september millum klokkan 9-16, og tað er ókeypis.

### Skeið fyri skúlanæmingum

Eins og í vár, tá eini 200 næmingar vóru á skeiði um mannarættindi, sleppa næmingarnir aftur í ár at nema sær kunnleika um evnið í sonevnda Mannarættindarúminum, sum Amnesty hevur innrættað til endamálið.

Hetta verður í september og oktober, har skúlaflokkar og næmingar læra um um mannarættindi og uppliva mannarættindabrot á egnan krop. Til ber at seta seg í samband við Amnesty og finna eitt tíðspunkt, nær vitjanin, sum er fýra tímar, kann vera.







**SPECIAL** (20 kg)
Turrfóður til vaksnar hundar. Er eisini sera gott til hundar við húð- og pelstrupulleikum og til eldri hundar.
Fyri posan...... **kr. 450,-**

**SØCLA** (20 kg)
Turrfóður til hvølpar, unghundar og tíkir, ið geva mjólk. Er eisini gott til aktivar hundar. SØCLA inniheldur C-vitamin.
Fyri posan...... **kr. 540,-**

**SKYTTENs KAT** (15 kg)
Turrfóður til kettur við nógvum proteinum frá fiski, flogfenaði og eggum. Inniheldur úrdráttir úr høsnarungalivur.
Fyri posan...... **kr. 390,-**

Kvalitetsfóður til kettur og hundar



**Bílegg beinleiðis á netinum**

www.fodursolan.com · info@fodursolan.com · Telefon 21 19 96   ÓKEYPIS ÚTKOYRING Í TÓRSHAVN OG NÆRINDIS



Ja, tað er spennandi at lesa Sosialin

Tekna teg sum haldara á tel. 34 18 00 ella send ein t-post til post@sosialurin.fo

Sosialurin

www.ebenezer.fo

SUNNUDAGSSKÚLIN
í Ebenezer er hvønn sunnudag kl. 12.00



Øll eru hjartaliga vælkomin!